# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

| Mál nr. : 23/00739 | Lóg: Lóg um familjuískoyti § 1a | Avgerð tikin: 30.03.2023 |
|---|---|---|

**Sýtt oljuískoyti – bústaður hitaður við fjarhita**


**Samandráttur:**
**Upplýst er í málinum, at kærarin hevur søkt um oljuískoyti. Hetta var sýtt, tí bústaðurin ikki er hitaður við olju, men við fjarhita.**

**Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Almannaverkinum um at sýta umsøkjaranum oljuískoyti við tí grundgeving, at bústaðurin ikki verður upphitaður við olju, men við fjarhita.**


**Kærda avgerðin**
Í avgerð dagfest 02.01.2023, skrivar almannaverkið soleiðis:
*"**Avgerð um at sýta oljuískoyti***
*Víst verður til tína umsókn um oljuískoyti.*
*Umsóknin er viðgjørd sambært løgtingslóg um familjuískoyti frá 24. desember 2015, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022.*
*Eftir lógini hava húski rætt til oljuískoyti, um samlaða inntøkan ikki fer upp um*
- *kr. 290.000, fyri húski, við 1 vaksnum við ella uttan børn*
- *kr. 390.000, fyri húski, við 2 vaksnum ella fleiri og 0, 1 ella 2 børn*
- *kr. 410.000, fyri húski, við 2 vaksnum ella fleiri og 3 ella fleiri børn*

*og/ella*
*samlaða ognin ikki fer upp um*
- *kr. 50.000, fyri húski, ið telur eitt ella tvey vaksin*
- *kr. 70.000, fyri húski, ið telur trý ella fleiri vaksin*

*Tað er eisini ein treyt, at húsini verða upphitað við olju. Hetta skal skjalprógvast.*
*Samsvar skal verða millum upplýsingar á umsóknini og skrásettar upplýsingar sambært Landsfólkayvirlitinum.*

***Grundgeving***
*Tú hevur ikki rætt til oljuískoyti, tí sambært upplýsingum frá umsóknini eru húsini upphitað við fjarhita..."*

**Í kæruummæli dagfest 06.02.2023, skrivar Almannaverkið:**
*"Viðvíkjandi kæru – málstal: 23/00739.*

*Gongdin í málinum:*
*07.11.2022 er umsókn og avrit av rokning frá Fjarhitafelagnum móttikin.*
*Tann 02.01.2023 er beinleiðis sýtan send. Grundgeving fyri sýtan er, at bústaðurin ikki verður hitaður við olju, men við fjarhita.*

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

*Avgerðin ið kærd er um:*
*Kærarin kærir um, at Almannaverkið ikki játtar henni stuðul til oljuískoyti, hon metur at hon hevur rætt til oljuískoyti, tí hon rindar tað sama sum tey sum hava oljufýr.*

*Grundgeving fyri sýtan:*
*Grundgeving fyri sýtan er, at bústaðurin ikki verður hitaður við olju, men við fjarhita. Almannaverkið metur, at oljuorka og fjarhiti er hvør sín orkukelda, og verður fjarhiti tískil ikki at meta sum oljuorka.*
*...”*

**Kærarin**
Í kæru móttikin í telduposti hin 09.01.2023, hevur kærarin skriva soleiðis:
*“Eg skilji ikki tað at eg ikki kann fáa oljuískoyti. Eg gjaldi tað sama, sum tey sum hava oljufýr. Tað hevur ikki verði bíligari at hava hitavekslara og fáa hitan frá Brennistøðini. Ofta hevur tað verði, at Fjarhitafelagið hevur hita upp við olju. Eg vóni tit kunnu kanna munin ímillum at hava oljufýr og tað at fáa hita frá Fjarhitafelaginum.”*

**Lógargrundarlagið**
Løgtingslóg um familjuískoyti frá 24.12.2015, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 25.10.2022.

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**
Føroya Kærustovnur skal viðmerkja, at orsøkin til ásetingar um oljuískoyti í lógini um familjuískoyti, er at hækkingin í prístalinum hevur verið óvanliga stórt í 1. og 2. ársfjórðingi í 2022 og rakar breitt og ymiskt og ávirkar fíggjarligu umstøðurnar hjá flestu húskjum. Ein høvuðsorsøk til samlaðu hækkingina í prístalinum er hækkingin á prísi á brenniolju til húsarhald.

Sambært lógini kunnu húski, sum lúka treytirnar um inntøku og ogn, og sum kunna skjalprógva útreiðslur til olju til upphiting av bústaðnum, har tey búgva, fáa rætt til oljuískoyti. Oljuískoyti er ein eingangsupphædd á kr. 10.000,-.

Hervið er tað soleiðis at onnur enn barnafamiljur kunnu søkja um oljuískoyti, í mun til familjuískoyti. Oljuískoyti verður sostatt veitt húskjum – bæði teimum við børnum og uttan børn. Tað er heldur ikki aldursmark, og tað merkir, at eisini fólkapensjonistar kunnu fáa oljuískoyti, um tey brúka olju til upphiting av bústaðinum, og um treytirnar viðvíkjandi inntøku og ogn eru loknar.

Eru tað fleiri vaksin í einum húski, skal øll inntøka hjá húskinum telja við í inntøkugrundarlagnum. Tað er sostatt, at hetta er við til at øll í húskinum eru við til at gjalda fyri ta olju, sum skal til fyri at hita bústaðin. Tí er tað húskið, sum skal søkja um oljuískoyti.

Sostatt er tað inntøkur hjá øllum persónum 18 ár ella eldri, sum búgva á búðstaðnum, ið telja við í inntøkugrundarlagnum. Lýkur húskið treytirnar, og samlaða inntøkan er lægri enn inntøkumørkini í hesi lógini, verður oljuískoyti á kr. 10.000,- veitt húskinum. Upphæddin verður útgoldin sum ein upphædd til ein persón í húskinum.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

Sambært § 1a í lógini, er ásett at oljuískoyti kann veitast til húski, ið kann skjalprógva útreiðslur til olju til upphiting av bústaði, har tey sambært fólkayvirlitinum eru skrásett at búgva.

Hetta hevur við sær, at kærarin ikki hevur rætt til oljuískoyti, tí sambært innlatnum skjølum, verður bústaðurin ikki upphitaður við olju, men við fjarhita.

**Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Almannaverkinum um at sýta umsøkjaranum oljuískoyti við tí grundgeving, at bústaðurin ikki verður upphitaður við olju, men við fjarhita.**